## SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ÚTSTYKKING VIÐ HAMRALIÐ

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

### ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

§ 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á kortskjølum 1 og 2 og er fyri matr nr. 226f, 226g, 226h, 226i, 226k, 226l, 226m, 226n, 226o, 226p, 226q, 226r og partur av matr. nr. 226a, Sandur.

### FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

§ 2. Sethúsendamál.

Stk. 1 Útstykkingin við Hamralið, er 7.533 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í øki A, Sethúsaøki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til sethúsaendamál.

Stk. 2. Útstykkingin við Hamralið hevur 14 grundøki, umframt tvinni felagsøki og eitt teltøki. Grundøkini eru millum 200 og 300 fermetrar til støddar. Felagsøkini eru umleið 600 og 350 fermetrar til støddar. Teltøkið er umleið 900 fermetrar til støddar.

Stk. 3. Atgongd til útstykkingina er frá Søltuvíkarvegnum og eru 2 atkomuvegir.

Stk. 4. Atkomuvegirnir frá Søltuvíkarvegnum leiða bilar og fólk inn til tey einstøku húsini.

Stk. 5. Spæl hjá yngri sum eldri verður miðsavna í felagsøkjunum.

### NÝTSLA ØKISINS

§ 3. Økið skal einans nýtast til sethúsabústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi so sum tjalding, har tað verður mett ráðiligt av bygdaráðnum.

### BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

§ 4. Tað kann bert byggjast innan fyri byggifeltini, ið eru víst á kortskjali 3.

Harumframt skal tað verða minst 5 m millum sethúsini og 2,5 m millum sethúsini og Úthús/bilhús á granna øki. Frástøðan millum tilbygning, ið ikki inniheldur uppihald, og úthús/bilhús á grannaøki skal verða minst 1,8 m.

Stk. 1. Byggifelt 1 er til sethús:

1.1. Mest loyvda stødd á húsum mált uttan er longd 11,0 m, breidd 6,0 m og 6,0 m hædd.

1.2. Byggjast kann í einari hædd við lofti. Við loyvi frá byggivaldinum, kann kjallari gerast undir veghædd, har mett verður at lendi loyvir hesum.

1.3. Planeringshædd fyri hvørt grundøki sær, verður ásett av byggivaldinum, samb. kortskjali nr. 4.

1.4. Úthang kann gerast 0,5 m út um byggifeltið, tó ikki í mark um húsini bert eru í einari hædd.

Stk. 2 Byggifelt 2 er til bilhús/úthús:

2.1. Mest loyvda stødd mált uttan er longd 5,0 m breidd 3,5 m og hædd 3,5 m.

2.2. Byggjast kann bert í einari hædd.

2.3. Mest loyvda hædd á møn er 3,50 m mált frá planeringshædd, mest loyvda hædd móti granna er 3,0 m, tá bygt verður, sum staðsett í kortskjali 3.

Stk. 3. Byggifelt 3 er til tilbygging, karnappar, svalar o.a:

3.1. Mest loyvda stødd mált uttan er longd 4,0 m, breidd 1,8 m og hædd 3,0 m móti granna. .

3.2. Byggjast kann bert í einari hædd.

Stk. 4. Byggifelt 4 er til kvistar á húsum:

4.1. Mest loyvda stødd mált uttan er longd 5,0 m, breidd 3,0 m og hædd 3,0 m. Kvistur kann ikki byggjast hægri enn mest loyvda hædd á húsum, sum er 6,0 m.

4.2. Byggjast kann bert í einari hædd.

Stk. 5. Byggistig og nýtslustig

5.1. Mest loyvda byggistig er 0,3 og mest loyvda nýtslustig er 0,5.

GARÐSKILDA OG GIRÐINGAR

§ 5. Ongin garðskilda er fyri økið.

Stk. 2. Girðing kann setast upp, men skal ikki lýta økið og bygginina.

Stk. 3. Um girðing verður gjørd, kann girðingin ikki gerast út betong ella øðrum stoypum tilfari. Tó kann fundament til garðar gerast, um hetta er undir jarðildi.

ÚTSJÓND HÚSANNA

§ 6. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av húsum og úthúsum/bilhúsum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

Stk. 3. Húsini skulu vera í jørðliti.

BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

§ 7. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Sands kommunu einsamøllum.

UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

§ 8. Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt kommunar og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

Soleiðis samtykt av Sands kommunu á kommunustýrisfundi tann 02.12.2013

Broytingin samtykt av Sands kommunu á kommunustýrisfundi tann 28.03.2022

| UMHVØRVIS - [redacted] MÁLARÁÐIÐ | |
| --- | --- |
| Mál nr.: | 22/13743 |
| Ættanarskriv: | – |
| Góðkent: | 13/2 - 2023 |
| Váttað: | |


Halgajørð
Vø ðujørð
226f
226g
226h
226i
226k
226l
226m
226n
226o
226p
226q
226r
226a
15c
ngshálvmørk
273
as
Reynabøur
Koytutrøð
Hamralíð
Kortskjal 1
Summarhúsøki á Sandi - Dagf. 13.11.201
Upprunaøki 1:1000 (ark A3)



Kortskjal 2
Summarhúsøki á Sandi - Dagf. 13.11.2013
Heildarætlan 1:1000 ( ark A3)



Halgajørð
15c
Kongshálvmørk
273
Koytutrøð
Hamralið
17000
15000
4000
3500
1300
1800
3900
Úthús
Hús
Tilbygging
Byggifelt
Vegur við haldi móti vegrennu
Felagsøki avhegnað
6000
1900
3500
3700
3400
2518
3647
Hegn at verja vøkstur og felagsøki
Teltøki avhegnað
Kortskjal 3
Summarhúsøki á Sandi - Dagf. 13.11.201
Staðseting av bygging
Mát 1:500 (ark A3)



Kortskjal 4
Summarhúsøki á Sandi - Dagf. 13.11.2013
Prinsippir fyri planeringshæddum
Mát 1:200 ( ark A3)




**Kortskjal 5**
**Summarhúsøki á Sandi - Dagf. 13.11.2013**
**Byggifelt til hús, úthús/bilhús, tilbygningar v**
**Mát 1:100 ( ark A3)**